## Uppsagnir hjá Danske Bank

Danske Bank hevur gjørt av at skerja rakstrarýtreiðslurnar við at miðsavna ráðgevingarvirksemið. Tað merkir, at bankin fær ikki brúk fyri øllum sínum ráðgevum longur, og tí verða 175 starvsfólk í bankanum verða søgd úr starvi. Harafturat verða 48 færri starvsfólk í Realkredit Danmark. Annars hevur Danske Bank júst almannakunngjørt úrslitið fyri fyrra hálvár í ár. Tað vísti knappar 2,4 milliardir krónur í avlopi fyri skatt. Tað var minni, enn marknaðurin hevði væntað. Metingin var góðar 2,7 milliardir krónur.




## Bjarnir á flogi

Í síðstu viku vóru tvey russisk bumbuflogfør inni í íslendskum loftøki. Talan var um tvey flogfør av slagnum TU-95 ella tvær sokallaðar Bjarnir. Morgunblaðið skrivar, at flogførini komu inn í íslendskt øki í landnyrðing úr landinum. Haðáni flugu tey suður við Eysturlandinum, áðrenn tey settu kós frá landi ímóti føroyskum øki. Tá flogførini vóru næst Íslandi, vóru tey 50 fjórðingar úr landi. Sambært Morgunblaðnum gjørdu tey russisku flogførini ikki vart við seg, men íslendsku flogferðslumyndugleikarnir kunnaðu ta sivilu flogferðuna um tey, og hvar tey vóru stødd.



*Sethúsasølan í USA hækkaði 3,6% frá mai til juni í ár og tað ber boð um, at komið er á botn í kreppuni, sum spakuliga er við at venda*

# Afturgongdin steðgað

**Tað er mangt sum bendir á, at stóra afturgongdin í búskapinum kring heimin er um at venda til framgongd. Tøl, kunngjørd í vikuni eru rættiliga positiv**

BÚSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Størsta hendingin í seinastu viku var, tá arbeiðsmarknaðartølini úr Amerika vórðu kunngjørd. Ein lækking á 325.000 arbeiðspláss var væntað, men kunngjørdu tølini vístu eina afturgongd á 247.000 arbeiðspláss, tá landbúnaðurin ikki er íroknaður.

Samstundis lækkaði arbeiðsloysið úr 9,5% niður í 9,4%, og hetta er fyrstu ferð, at arbeiðsloysið í USA lækkar síðani apríl 2008. Men hóast arbeiðsloysið lækkaði í juli verður væntað, at arbeiðsloysið framhaldandi fer at vaksa.

Kunngjørdu tølini viðførdu, at partabrøvini hækkaðu fríggjadagin, samstundis sum marknaðarrentan hækkaði, nú útlitini eru vorðin bjartari.

Seinasta vikan byrjaði eisini við positivum tíðindum úr USA. ISM vísitalið fyri framleiðslugeiran varð kunngjørt, og her var væntað ein hækking úr 44,8 upp í 46,5, men hækkingin gjørdist heilt upp í 49,9 fyri juli.

Talið er tó framvegis undir 50 og tað merkir, at talan enn er um afturgongd í USA. Væntað verður tó, at vísitalið fyri framleiðslugeiran fer at kvinka upp um 50 einaferð seinni í summar, og tað verður tá eitt tekin um, at búskapurin vendir frá afturgongd til framgongd.

Eisini PMI vísitølini fyri fleiri europeisk lond vístu framgongd, samstundis sum positiv tíðindi eru at frætta fyri bilasølu og byggivirksemi.

## Rentufundir

Tøl fyri, hvussu nógv sethús eru í gongd við at verða seld, tað sonevnda Pending Home Sales, vórðu kunngjørd seinasta týsdag. Tey vístu eina framgongd á 3,6% frá mai til juni. Hetta stuðlar sjálvandi undir postivu gongdina á amerikanska sethúsamarknaðinum, sum hevur verið seinastu tíðina.

Nýggjastu tølini frá danska tjóðbankannum vísa, at gjaldoyragoymslan framhaldandi hækkar. Gjaldoyragoymslan var í juli 336,4 milliardir krónur, og av tí, at goymslan er so høg eru útlit fyri, at leiðandi danska rentan fer at lækka enn meira, hóast ein tíð kan ganga, áðrenn tað hendir.

Sum væntað broyttist leiðandi rentan hjá ECB ikki hósdagin eftir rentufundin hjá europeiska miðbankanum. REFI, sum er heitið á leiðandi stýringsrentuni í evrulondum, er framvegis 1%, meðan leiðandi danska útlánsrentan, REPO, framvegis er 1,55%.

Eisini Bank of England hevði rentufund hósdagin. Her tók enski tjóðbankin øll á bóli, ikki við at broyta rentuna, men við at kunngera, at bankin fer at víðka keypiætlanina av virðisbrøvum við 50 milliardum pundum til íalt 175 milliardir pund.

Hetta gjørdi, at renturnar á bretskum statslánsbrøvum fullu, samstundis sum bretska gjaldoyrað viknaði.

*Kelda: Føroya Banki*

### FAKTA

PMI: Spyrjirunda, har mett veður um útlitini hjá stórum fyritøkum í Europa. Er vísitalið størri enn 50 væntast búskaparlig framgongd, er tað undir, væntast afturgongd.

ISM: Spyrjirunda, har mett verður um útlitini hjá stórum fyritøkum í USA. Er vísitalið størri enn 50 væntast búskaparlig framgongd, er tað undir, væntast afturgongd.

## Húsaeigarar stríðast við skuld

**Fallandi húsaprísir fara at føra milliónir av amerikanskum húsaeigarum út í tekniskan insolvens áðrenn 2011**

BÚSKAPUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Fallandi húsaprísir fara at føra milliónir av amerikanskum húsaeigarum út í tekniskan insolvens áðrenn 2011. Tað vísir ein nýggj kanning, sum Deutsche Bank hevur gjørt.

Sambært frágreiðingini vórðu umleið 14 milliónir húsaeigarar skuldarbundnir fyrsta ársfjórðing í 2009, um teir høvdu selt húsini til marknaðarprís.

Tað talið fer at økjast til 25 milliónir áðrenn fyrsta ársfjórðing 2011, og tað svarar til útvið helmingin av øllum húsaeigarum í USA, skrivar húsaheimasíðan, propertywire.com.

Støðið av tekniskum insolvensi er tengt at hvat slag av láni, viðkomandi hevur, stendur at lesa í frágreiðingini hjá Deutsche Bank.

Tað eru serliga sonevndu subprime-lánini, ið vórðu nógv nýtt beint undan fíggjarkreppan byrjaði, ið gevur húsaeigarunum reyð tøl á botnlinjuni, skrivar boersen.dk.